## Tvey ár afturat til Armstrong



Sjeyfaldi Tour de France-vinnarin, Lance Armstrong, hevur nú boðað frá,a t hann ætlar sær ikki at gevast við súkkluíróttini fyrr enn í 2011. Tað sigur hann í viðtali við Gazzetta dello Sport. Armstrong hevur júst skrivað undir sáttmála við Team Radio-Shack, og sjálvur heldur Armstrong, at hetta er besta liðið, sum hann nakran tíð hevur verið á. Eisini hóast hann slær fast, at hetta liðið snýr seg ikki um Armstrong men um at vinna.

## 25 milliónir upp á spæl mikudagin

Leygardagin vann ein einsamallur lotto-vinnari 11 milliónir, men longu mikudagin er potturin aftur á tremur. Eingin hevur vunnið joker-puljuna síðani 19. september, og tí eru ikki færri enn 25 milliónir í pottinum til dráttin mikudagin. Hetta er tó ikki meira enn triði-største joker-vinningurin, sum nakran tíð er latin. Í 2005 vann ein spælari í Keypmannahavn næstan 36 milliónir, og beint undan jólum í fjør vann ein spælari í Hillerød næstan 31 milliónir.

### Stjørnan-Tjaldur 20-15 (10-8):

# Stjørnan orkaði betur

**Beinanvegin í seinna hálvleiki útbygdi Stjørnan leiðsluna, ið var vunnin fyri hálvleikssteðgin, og so var oddadysturin hjá teimum báðum bestu liðunum í Sunset-kappingini longu avgjørdur**




einslistin@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen




**Stjørnuspælararnir Valentina Suciu og Bára Skaale Klakstein bjóða verjuni hjá Tjaldri av**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Tjaldur fekk sín fyrsta ósigur hetta kappingarárið, tá kvinnurnar úr Runavík seinnapartin í gjár vitjaðu Stjørnuna í Klaksvík. Framvegis er tó einki avgerandi broytt á stigatalvuni, tí har eru hesi bæði liðini framvegis púra leys av øllum hinum. Einasti munurin er, at nú hava Tjaldur og Stjørnan sama stigatal, men at Tjaldur enn eigur oddasessin, tí málúrtøkan er fýra mál betri.

Í gjár var Stjørnan annars fimm mál betri, tá avtornaði, men tað var nú Tjaldur, ið kom betur frá byrjanini í dystinum. Tað tóktist fyrstu løtuna, sum hevði Stjørnan trupulleikar við at fáa skil á sínum egna verjuspæli, umframt at tað ikki var sørt, at nervar sóust á heimaliðnum.

Men tá so nakrar justeringar blivu gjørdar, fór at ganga betur. Annika Ljósstein kom inn í verjuna, og tað munaði beinanvegin. Stjørnan fekk strítt seg upp á javnt, Tjaldur fór framum av nýggjum, men so setti Stjørnan seg á dystin – fór framum og læt ongantíð Tjaldur aftur sleppa upp í part.

Serliga síðstu fimm minuttirnir av fyrra hálvleiki og teir fyrstu 10 av seinna hálvleiki høvdu avgerandi týdning fyri, at Stjørnan fekk sett Tjaldur upp á pláss. Fyrst legði Stjørnan seg tvey mál framum fyri steðgin, og beint eftir steðgin økti heimaliðið um leiðsluna, so Tjaldur ongantíð kom afturíaftur.

### Durita góð á vonginum

Tá Tjaldurskvinnur komu aftur á vøllin eftir hálvleikssteðgin, sá venjarin, Bogdan Burcea, sera uppgevandi út og stóð langt frá bonkinum. Úti á vøllinum tóktist sama máttloysi gera vart við seg, og í seinna hálvleiki bendi einki á, at Tjaldur trúði uppá, at nakað kundi gerast við Stjørnuna.

Kanska var tað eisini ivasamt, um Tjaldur kundi gjørt nakað við Stjørnuna heldur, og serliga tóktist tað sum ein sera skilagóð avgerð hjá Stjørnu-venjaranum, Morten Hust Petersen, at seta Duritu Christophersen á høgra vong, tí har royndist hon framúr væl. Hon skoraði upp á allar sínar møguleikar á vonginum og var eisini toppskjútti hjá Stjørnuni við sjey málum!

Sum dystinum leið, kom eisini til sjóndar, at konditiónin hjá Stjørnuni eftir øllum at døma er eitt ella tvey stig framman fyri hana hjá Tjaldri, tí tá Stjørnan setti ferðina upp, var einki um Tjaldur. Stjørnan hevði orku at gera skjótt av og eisini at brúka skjótálop, men slíkt var ikki at síggja hjá gestunum, ið heldur ikki megnaðu at skunda sær fram eftir vøllinum, hóast tað fleiri ferðir eydnaðist at pilka bóltin frá Stjørnuni í álopi.

Sum vant var Adina Petrea toppskjútti hjá Tjaldri, men Stjørnan hevði so gott tjóður á henni, at tað bara bleiv til fýra mál í hennara lut í Klaksvík í gjár. Og tá einki lá fyri hjá henni, var eingin annar, ið kundi lyfta í hennara stað, so tí gjørdist hetta á ongan hátt ein dystur, Tjaldur fer at minnast væl aftur á. Men ávaringina hevur liðið nú fingið frá Stjørnuni, ið hevur enn fleiri streingir at spæla uppá, enn liðið fekk víst hesa ferð!

## FAKTA um dystin

**Stjørnan-Tjaldur 20-15 (10-8)**
**10 min:** 2-2
**20 min:** 4-5
**40 min:** 13-8
**50 min:** 16-11
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Durita Christophersen 7, Valentina Suciu 4, Simona Petersen 3, Joan M. Djordjevic 2, Edith Hansen 1, Bára Skaale Klakstein 1, Annika Ljósstein 1, Durita Mikkelsen 1
**Tjaldur:** Adina Petrea 4, Cornelia Rimbu 3, Heidi Sevdal 3, Annika Thomsen 2, Mary-Ann Isaksen 1, Jóhanna í Króki 1, Sarah Ann B. Thomsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 2, Tjaldur 2
**Útvísingar:** Stjørnan 5, Tjaldur 7
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

## Ikki í gongd

Tjaldur hevði undan dystinum ímóti Stjørnuni í KÍ-høllini í gjár enn ikki tapt ein dyst í Sunset-kappingini, men tað tóktist ikki oyðileggja dagin hjá Anniku Thomsen og hinum úr felagnum í Runavík.

– Eina ferð skuldi verða fyrstu ferð, at vit taptu í hesum kappingarárinum, og so var tað bara gott fyri okkum, at tað hendi í einum dysti, sum ikki hevði so nógv at siga, segði hon.

– Vit fylgdust nokk so væl í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki fingu vit ikki spælið at flóta og fingu heldur ikki ferð á, meðan tær bygdu tað upp og fingu meira og meira ferð á. Tí vunnu tær dystin.

Annika Thomsen tekur undir við navnanum Ljósstein, at tað dystirnir ímóti Stjørnuni eru stuttligari enn hinir.

– Sjálvt um vit taptu, so var hetta stuttligari, tí hetta eru tvey jøvn lið. Síðst vunnu vit við fimm málum og nú vunnu tær við fimm. Hetta er tað, sum ger tað spennandi at spæla.

**hil**

## Verða betri

Hóast Stjørnan í gjár vann á Tjaldri, heldur Annika Ljósstein, at tær í Stjørnuni kunnu gerast uppaftur betri, tá tær eina ferð hava allar spælararnar til taks í senn.

– Vit í Stjørnuni eru sjálvsagt nøgdar við sigurin í dag, hóast tað enn manglar eitt lítið sindur í hjá okkum. Næstan alla tíðina hava vit verið onkrar spælarar fyriuttan, so vit verða heilt ótrúligar, tá vit eina ferð eru fullmannaðar, segði hon eftir dystin ímóti Tjaldri í gjár.

Samstundis er hon ikki í iva um, at Stjørnan og Tjaldur hava klárt tey bestu kvinnuliðini, tí tey – í mun til hini feløgini – hava raðfest kvinnuhondbóltin.

– Av tí at so stórur munur er á hesum báðum liðunum og restini, eru dystirnir ímóti Tjaldri nógv stuttligari at spæla. Her eru nærdystir, javnari spæl og alt tað, sum ger tað stuttligt. Tað rokni eg við, at tær í Tjaldri eisini halda, sigur Annika Ljósstein.

**hil**